# Eysturkommunu býráð

## Býráðsfundur verður mikudagin tann 22. juni 2016 kl. 19.30

**Fundarskrá:**

1. **16/00006**
   **Umsókn um byggiloyvi til koblingsstøð hjá SEV**
   Umsókn um byggiloyvi til koblingsstøð hjá SEV við Leirvíksvegin innan Eið (Uppí á Dal) er móttikin saman við tekningum og staðseting til bygning og innkoyring.

   Á býráðsfundi tann 6. juni 2016 var samtykt at viðmæla umsókn frá SEV at keypa jørð av festinum.

   Umsitingin mælir til at byggiloyvi verður givið og at útskrivað byggiloyvið tá ið SEV hevur ognar sær jørðina og henda er frámatrikulerað.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til fylgja tilmælinum frá umsitingini.

2. **16/00202**
   **Umsókn um vinnuøki í Norðragøtu, matr. nr. 193e og 193d**
   Umsókn um keyp av vinnuøki uml. 3000 $m^2$ sum liggur norðaliga á økinum.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til fylgja tilmælinum frá umsitingini.

   Tilmæli frá fíggjarnevninii og vinnunevdini fyriliggja til fundin.

3. **16/00133**
   **Vaski- og spulipláss í Norðragøtu**
   Arbeiðstøkan er bjóða út og tilboð kom frá 2 fyritøkum og eru tilboðini:

   Støðutakan til innkomin tilboð

4. **16/00214**
   **Umsókn um marknaumskipan og keyp/søla av matr. nr. 370 í Leirvík**
   Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp/ sølu av matr. nr. 370 sum liggur fram við Brúsánni i Leirvík.
   Saman við umsóknini eru tekningar sum lýsa hvat sølan fevnir um.

   Umsitingin metir at kommunan skal ogna sær uml. 26 $m^2$ av matr. nr. 370 sum er økið framvið Brúsánni. Kostnaður fyri hesar fermetrar er uml. 5.000,00 kr.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla søla av matr. nr. 370 og at leggja part av matriklinum til matr. nr. 147bh. Byggi- og býarskipanarnevndin mælir eisini til at Eysturkommuna keypir uml. 26 $m^2$ av matr. nr. 370 sum er ein teigur fram við Brúsánni.

   Tilmæli frá fíggjarnevndini fyriliggur til fundin.

5. **15/00420**

**2.viðgerð av eykajáttan til keyp av úthúsi og matr. nr. 144 í Syðrugøtu**
Við 1. viðgerð á býráðsfundinum tann 6. Juni 2016 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr 150.000,00 til keypið íroknað niðurtøku av húsinum og tinglýsing.

Peningurin verður tikin av innistandandi

6. **16/00174**
   **2. viðgerð av eykajáttan til asfaltering og liðugtger av økjum**
   Við 1. viðgerð á býráðsfundinum tann 6. Juni 2016 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr 520.000,00 kr.

   Peningurin verður tikin av innistandandi

7. **13/00394**
   **2.viðgerð av eykajáttan til fríðkan av økinum omanfyri neystini í innara Bug í Leirvík**
   Við 1. viðgerð á býráðsfundinum tann 6. Juni 2016 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr 200.000,00 kr.

   Peningurin verður tikin av innistandandi